TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogiskar ráðgevar til Stuðulsfólkaskipanina

Søkt verður eftir tveimum pedagogiskum ráðgevum til Stuðulsfólkaskipanina í Tórshavnar kommunu at byrja 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

Stuðulsfólkaskipanin, ið er partur av sosialu deild í kommununi, hevur eina **Serdeild,** sum m.a. tekur sær av børnum og ungum við varandi breki og menningartarni, og eina **Familjudeild,** sum tekur sær av børnum, ið hava aðrar trupulleikar.

**Størvini**
Ráðgevarnir hava ábyrgd av hvør sínari deild og samstarva við stuðulsfólk, stovnar og foreldur innan deildina.

Høvuðsuppgávurnar eru at:
- vera sambindingarliður millum leiðaran og stuðulsfólkini
- kunna um gongdina í stuðulsmálum
- tryggja, at arbeiðssetningar verða gjørdir fyri stuðulstiltøkini
- veita stuðulsfólkunum supervisión og fakliga ráðgeving
- hava dagliga eftirlitið og eftirmeta stuðulstiltøkini saman við pørtunum
- ráðgeva í og tryggja, at stuðulsfólkini skrivliga dokumentera arbeiðið
- gera eygleiðingar og lýsingar av børnum
- skapa umstøður, so at stuðulsfólkini kunnu trívast í arbeiðinum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava námsfrøðiliga útbúgving og drúgvar starvsligar royndir innan sernámsfrøði. Harumframt skal viðkomandi hava hug at arbeiða við børnum og familjum, ið hava serligan tørv, og vera opin fyri neyðugari menning í arbeiðinum.

Fyrimunur er, at hava servitan innan ráðgeving/supervisión ella leiðslu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Sum liður í menningini av deildini verður skipað fyri supervision og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Birgit Debess, leiðara í Stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara, tlf. 315160.

**Umsóknir**
við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn og vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. juni 2002.

SNARSKIVAN



**FORD FIESTA I CL**
Árg Nov-91, Km 113.000.
Metallakk.
Kr.25.000.



**CITROEN XSARA 2,0 HDI**
Árg Okt-99, Km 52.000.
Aircondition, fjarstýrt sentrallás, el-rútar, hitaði forsetur, multifunktiónsróður. Metallakk..
Kr. 142.000.

**BILVERKSTAÐIÐ**
V/H.J. KOLLSKER · TLF. 31 32 62 - 21 10 13
100 TÓRSHAVN

## Roknskaparleiðari

Til eitt handilsvirki við høvuðsæti í Tórshavn, verður søkt eftir einum roknskaparleiðara. Í bókhaldinum starvast frammanundan tvey fólk, men við vaksandi virksemi er tørvur á einum fólki afturat at standa fyri roknskapardeildini.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhalds- og roknskaparabeiði og aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum hoyra til hetta.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaðir og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2002.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30 — Sp/f nr. 267
FO-110 Tórshavn — e-mail:
Tlf. (+298) 311017 — rasmussen@rasmussen.fo
Fax (+298) 311018 — Http://www.rasmussen.fo

## Listaframsýning á Ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning á Ólavsøku í Müllers Pakkhúsi

Opið verður 28., 29., 30., og 31. juli frá kl. 14.00-20.00

Hevur tú hug at luttaka í hesi framsýning, set teg so í samband við Lions Club Tórshavn
tlf. 318304 - 314400 - 313197

Ágóðin fer til hornorkestrið hjá Frelsunarherinum

**Lions Club Tórshavn**

## Hýruvognstakstirnir hækka

Frá 15. juni 2002 hækka takstirnir fyri at leiga ein hýruvogn við 10%.

Nærri verður lýst í bløðunum seinni.

**P/F Auto, tlf. 311234**

Sosialurin

*Vegna fáar umsóknir verður starvið lýst av nýggjum*

## Leiðari til Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. juli 2002 ella skjótast tilber.

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Á Barnaheiminum er í løtuni ein Ungdómsdeild við 6-7 børnum. 7 starvsfólk eru á deildini. Á Barnaheiminum er harafturat skrivstovuhjálp og húsavørður hálva tíð. Verandi leiðari er fyribilssettur.

Frá 1. august í ár verður sett á stovn Familjudeild, har foreldur og børn kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Væntandi kunnu upp til 4 familjur vera á deildini í senn. Søkt hevur verið eftir 10 starvsfólkum til deildina.

Ætlandi verður eisini ein Smábarnadeild latin upp í næstum at taka ímóti børnum frá 0-12 ár.

Føroya Barnaheim er ein stovnur, sum við umsorgan, eygleiðing og viðgerð skal virka fyri at skapa trygg og mennandi kor fyri børn, ung og foreldur, meðan tey eru á heiminum. Hetta skal gerast í tøttum samstarvi við familjuna, barnavernd, stovnar og fakfólk annars við tí endamálið at geva innskrivandi barnavernd betri møguleikar at meta um støðuna hjá barninum/familjuni og møgulig framhaldandi hjálpartiltøk.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Týðandi partur av starvinum sum leiðari er samstarv við avvarðandi, barnaverndir, myndugleikar, skúla, ansingarstovnar, heilsuverk umframt fakfólk og onnur, ið varða av barninum/familjuni.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðaraevni, hevur áræði og dugir at ganga nýggjar leiðir, dugir at samstarva við ymisku fakbólkarnar og at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri tey, sum búgva á heiminum, og starvsfólkini.

Til starvið krevst útbúgving sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi við eftirútbúgving innan leiðslu og familjuterapi ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson á telefon 319727 eftir kl. 17.00.

Skrivlig umsókn við prógv, viðmælum, v. m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 14. juni 2002 kl 14.00.

**Stýrið fyri Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

## Útróðrarbátur til sølu

Sómi útróðrarbátur til sølu við allari útgerð.

**Tlf. 421171**



## Skrivstovufólk
**til posthúsini í Tórshavn/Argir**

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki at arbeiða 1/2 tíð (40 tímar aðru hvørja viku) á posthúsunum í Tórshavn/Argir. Byrjast kann beinan vegin. Arbeiðstíðin kann liggja millum 07.30 og 20.30. Arbeitt verður mánadagar til fríggjadagar. Í fyrstu atløgu er talan um at arbeiða á posthúsinum á Argjum. Arbeiðstíðin har er 08.30 til 16.30. Talan verður fyrst um 3 mánaðar royndartíð við upplæring.

Arbeiðið fevnir um kassaavgreiðslu og vanligt postskrivstovuarbeiði.

Førleikakrøv: Minsta krav er FHS-útbúgving.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Umsóknir skulu sendast til:

**Postverk Føroya**
Avgreiðsluleiðarin
Óðinshædd 2
110 Tórshavn

og verða okkum í hendi fyri 10. juni 2002.

Nærri fæst at vita mánadag – fríggjadag á tlf. 315562, lokal 138 (beinleiðis tlf.)

**Postverk Føroya**

## Fólk søkist

Vit sóknast eftir fólki til arbeiði í gólvhandli, at byrja beinanvegin.
Royndir innan øki, eru ein fyrimunur.

Skrivlig umsókn, merkt "Umsókn", verður at senda til:

**Profa Farvur**
Staravegur 5 · Boks 3137 · Tel 31 92 20

team85

**bobcat** -maskinurnar sum halda!

- **Gravmaskinur** –nógv model
- **Lessarar við óteljandi møguleikum!**

**Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.**



Keyp góðsku
– keyp Bob Cat!

Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

## Handilslærlingur
**til Teymavirkið í Runavík**

**Teymavirkið P/f** í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt.

**Vit bjóða** eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

**Vit vænta**, at tú ert fyrikomandi og hevur hug og áræði at gerast partur av okkara arbeiðsdegi, sum við hvørt er eitt sindur strævin, men hóast tað stuttligur.

**Umsókn** við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. juni 2002.

**Meiri** fæst at vita við at venda sær til Eyðvør Berg á tlf. 473 000.

Teymavirkið í Runavík og Snørisvirkið í Klaksvík, eru einastu fyritøkur í Føroyum, ið framleiða línu, teymar og togverk. Afturat skipshandlunum, har m.a. arbeiðsklæði og trygdarútgerð er at fáa, hava bæði virkini búnýtis- og klædnadeildir. Í alt eru 20 fólk í starvi hjá Teymavirkinum og Snørisvirkinum.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Bókavørður

Á Býarbókasavninum er eitt hálvtíðarstarv sum bókavørður leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið er lutvíst í útláninum fyri vaksin og á barnabókasavninum. Harumframt snýr arbeiðið seg um skráseting o.t.

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at umsøkjarin hevur útbúgving sum bókavørður.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 1. august 2002, ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Onnu Brimnes, býarbókavørð, tlf. 313626, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. juli 2002.

SNARSKIVAN





## Rotatiónsprentari
**til Prentmiðstøðina**

Eitt starv sum rotatiónsprentari er leyst at seta skjótast tilber.

***Starvið:***
Talan er um eitt starv sum rotatiónsprentari á blaðprentsmiðjuni við Smyrilsveg har øll tey føroysku dagbløðini, umframt onnur bløð, verða prentað.

Vit kunnu bjóða tær:
- fast arbeiði við góðari løn
- sjálvstøðugt arbeiði
- neyðuga upplæring
- møguleika fyri at menna prentsmiðjuna og teg sjálvan

***Førleiki:***
- útbúgvin prentari
- hava áhuga at prenta við rotation
- vera nærlagdur og kenna ábyrgd

***Setan:***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Prentsmiðjufelag og Føroya Prentarafelag.

***Umsókn:***
Skrivlig umsókn skal vera Prentmiðstøðini í hendi í seinasta lagi 10. juni 2002.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Húsgarð á tlf. 351400 ella 213514.

**Prentmiðstøðin**
Smyrilsvegur 13 • FO-100 Tórshavn
Tlf. 351400 • Fax 351401

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Reingerðarfólk

Tórshavnar kommuna søkir eftir reingerðarfólki til dagrøktina á Kirkjuvegi. Arbeiðstíðin er 4 tímar um dagin, løn sambært sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Eisini er brúk fyri avloysarum.

Áhugaði verða biðin um at senda skrivliga umsókn til Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn ella seta seg í samband við Janus Isfeldt, tlf. 315160 ella Noru Olsen, tlf. 311977, í seinasta lagi 10. juni 2002. Viðmerk á umsóknina "Reingerðarfólk"

SNARSKIVAN

## Hygg her

Hví pussa og mála, tá ið tú kanst gera bæði í somu arbeiðsgongd.

Skalcem puss og betongmáling.

Nærri fæst at vita við at ringja á

**tlf. 455775**
Arne Samuelsen
Heygavegur 11 · 700 Klaksvík